# Mjølnir nærkast gullinum

**Við einum 3-1 sigri á SÍ mikukvøldið tók Mjølnir seg enn nærri meistaraheitinum, sum verður endaliga avgreitt leygardagin**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tveir dystir í meistaradeildini hjá kvinnum í flogbólti vóru leiktir mikukvøldið. Mjølnir hevði í Klaksvík vitjan av botnliðnum SÍ, og hevði Mjølnir snávað, vóru meistaravónirnar óivað køvdar.

### Misjavnt avrik

Mjølnir vann dystin móti sørvágskvinnum 3-1, og sum skilst var avrikið hjá heimaliðnum ikki serliga sannførandi, men tó nóg gott til at vinna dystin.

Heimaliðið vann tvey tey fyrstu settini, men triðja settið gjørdist sera spennandi, og tað eydnaðist SÍ at vinna settið 26-24, áðrenn Mjølnir vann fjórða settið og harvið dystin.

Hin dysturin í meistaradeildini hjá kvinnum mikukvøldið var leiktur í Hoyvíkshøllini, har KÍF hevði vitjan av Drátti. Bronsuvinnararnir úr Vágum vunnu ein tryggan 3-0 sigur. Settúrslitini vóru: 21-25, 11-25 og 23-25.

Komandi leygardag verða teir báðir seinastu dystirnir í meistaradeildini hjá kvinnum leiktir, og tá fær Mjølnir vitjan av ÍF í Klaksvík, meðan hitt oddaliðið TB fær vitjan av SÍ í Trongisvági. Mjølnir og TB eru jøvn í stigum í løtuni, men klaksvíkskvinnur hava betur settmun, og tí hava tær betur kort á hondini undan dystunum leygardagin.

# Claus er komin fyri seg



*Claus Bech Jørgensen hevur gjørt sítt til, at Coventry er við at berja seg upp úr niðurflytingarvandanum í næstbestu deildini í Onglandi.*

*savnsmynd*

**Føroyski landsliðsspælarin eigur stóran lut í, at Coventry síðstu vikurnar hevur styrkt eitt sindur um sína støðu í kappingini um at sleppa undan niðurflyting**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Tað stendur um lív hjá Coventry í næstbestu eingilsku deildini. Felagið hjá føroyska landsliðsspælaranum er dygst omanfyri niðurflytingarstrikuna. Bara málmunurin er á muni millum Coventry og felagið, sum er á triði niðasta plássinum og harvið á niðurflytingarplássi, og felagið, sum er fimti niðast og harvið á plássinum omanfyri Coventry.

Hesar seinastu ferðirnar hava ábendingar verið um, at Coventry er um at fóta sær, og at teir kanska fara at hóra undan, men enn er nógv at kappast um og stríðast fyri. Átta umfør eru eftir at spæla, og onkur av feløgunum, sum eru niðanfyri Coventry á støðutalvuni hava seinastu vikurnar fingið eitt sindur av luft undir veingirnar. Tí hevur tað verið rættuliga avgerandi fyri Coventry, at teir í fýra teimum síðstu uppgerðunum ikki hava tapt. Tríggjar ferðir hava teir fingið eitt stig burturúr, og eina ferð hava teir vunnið.

Í fleiri av uppgerðunum, tá ið Coventry hevur fingið stig, hevur føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen verið eyðsýndur. Hóast hann framvegis hevur ilt við at vinna fast pláss á liðnum, so tykist tað sum um, at hann rættuliga er komin fyri seg eftir skaðan, sum hann fekk, tá ið hann var í Nicosia í oktober og skoraði annað málið í 2-2 uppgerðini hjá Føroyum ímóti Kypros.

Týskvøldið var Coventry í Millwall. Úrslitið var 1-1. Millwall, sum er nummar átta, og sum fyrrverandi Chelsea kempan Dennis Wiese er oddamaður fyri, legði seg framum við brotssparki eftir steðgin.

Tá ið tólv minuttir vóru eftir, varð Claus Bech Jørgensen settur á vøllin, og tá ið ein minuttur var eftir, syrgdi føroyski landsliðsspælarin við einmansavriki fyri, at Coventry fekk eitt stig við sær til hús.

Claus Bech Jørgensen sneiddi framvið fleiri mótstøðumonnum, og hann var um at fara um koll, tá ið hann sendi bóltin í málið. Bæði Coventry venjarin, Micky Adams, og Dennis Wiese søgdu eftir dystarenda seg hava hildið, at dómarin bríkslaði fyri brotssparki, og at teir vóru ovfarnir, tá ið teir sóu, at dómarin peikaði á miðjuna.

Næstsíðsta leygardag vann Coventry 3-2 á heimavølli ímóti Watford. Ta ferðina var Claus Bech Jørgensen á miðvøllinum allar 90 minuttirnar, og hann javnaði til 2-2.

Claus Bech Jørgensen boðaði um ársskiftið frá, at hann var so mikið ónøgdur við, at hann ikki slapp framat á besta Coventry liðnum, at hann hevði tikið avgerð um, at hann fór at royna at finna sær annað felag, tá ið sáttmálaskeiðið hjá honum í Coventry verður runnið í summar. Higartil hevur einki verið at frætt um, um nakað felag hevur verið framvið. Tað kann væl hugsast, at bæði Coventry og onnur feløg nú fara at fáa eyguni upp fyri, at tað er dugur í føroyska landsliðsspælaranum, sum altíð hevur havt gott máltev - tá ið hann er sloppin framat at spæla.

Í morgin verður avbjóðingin hjá Coventry stór. Tá skulu Claus Bech Jørgensen og liðfelagarnir spæla á útivølli ímóti Sunderland, sum er greitt oddalið í næstbestu deildini.

# Árliga fimleikaframsýningin hjá Støkk

TÍÐINDASKRIV

Vikuskiftið 19. og 20. mars hevur Støkk sína árligu fimleikaframsýning í ítróttarhøllini í Runavík. Framsýningarnar byrja kl 15 báðar dagarnar.

Øll liðini hjá felagnum eru við til framsýningarnar báðar dagarnar, tó verða merkir og íðnisprógv handað sunnudagin. Framsýningarnar eru mettar at vara umleið 2 tímar fyrra dagin og 3 tímar seinna dagin.

Eins og undanfarin ár hevur felagið nógvan fjølbroyttan fimleik at vísa fram, m.a. móðir og barn, børn 5-6 ár, vanligu liðini frá 1-10 flokk, ungar kvinnur, aerobic, reiðskapslið, stórkappingarlið og blandað lið við kvinnum og monnum.

Felagið skipar fyri páskareggatombola og kaffisølu í gongini í ítróttarhøllini báðar dagarnar.

Atgongumerkjasølan byrjar 1 tíma áðrenn framsýningina. Kostnaðurin er 70 kr. fyri vaksin og 20 kr. fyri børn.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

Tjaldur-VÍF 13-33

# Greiður sigur til VÍF

Ikki óvæntað vunnu kvinnurnar hjá VÍF ein greiðan sigur, tá ið tær mikukvøldið vóru í Runavík og spældu útsetta dystin móti Tjaldrinum, sum eftir ætlan skuldi verið leiktur seinasta sunnudag. Tá bleiv dysturin útsettur fyri veður, men mikukvøldið var hann so avgreiddur, og VÍF vann ein greiðan sigur 33-13 á botnliðnum úr Runavík.

Vit hava ongan dómaraseðil fingið sendandi úr Runavík, og tí ber ikki til at gera eitt yvirlit yvir málskjúttar v.m.

**tn**